SOSIALURIN 89
FRÍGGJADAGUR 4. AUGUST 2017


# AVGERANDI FYRI MEG AT STJÓRNARSKIPANIN VIRÐIR GRUNDLÓGINA

– Lat meg staðfesta beinavegin, at eg eri heitur talsmaður fyri ríkisfelagsskapinum og sum eg havi skilt, er hetta eitt skjal, sum virðir verandi grundlóg og stjórnarskipan og tað er avgerandi fyri meg, sigur Lars Løkke Rasmussen, forsætismálaráðharri í Danmark. Sosialurin hevur hitt Lars Løkke Rasmussen til eitt prát um stjórnarskipanina, um nýskpanir, um ES og um at ferðast í Føroyum.

SÓLVIT E. NOLSØ
SOLVIT@SOSIALURIN.FO

Meðan Aksel V. Johannesen, løgmaður, á Ólavsøku legði út uppskot um stjórnarskipan Føroya til almenningin at taka støðu til, var danski forsætismálaráðharrin í Føroyum sum ferðandi familjumaður. Hetta er ikki fyrstu ferð, at stjórnarskipanin er komin upp at venda í Føroyum og søgan sigur okkum, at danskir forsætismálaráðharrar ikki eru serstakliga nøgdir við støðuna, tá ið Føroyar byrja at nærkast egnari stjórnarskipan. Í so máta má staðfestast, at støðan í ríkisfelagsskapinum ikki er broytt. Men tað er ikki stjórnarskipanin, sum er orsøk til, at Lars Løkke Rasmussen hendan dagin er í Føroyum og er tøkur til eitt prát við Sosialin um tað, sum hendir í heiminum, í ríkisfelagsskapinum og í Føroyum.

Hendan sunnudagin eftir ólavsøku hava vit sett okkum í Kafé Kaspar, at seta Lars Løkke Rasmussen nakrar spurningar, millum annað um stjórnarskipanina, ið skal til fólkaatkvøðu í næsta ár.

Ein løta gongur, so koma forsætismálaráðharrin og myndamaðurin hjá Sosialinum spákandi niðan eftir Áarvegnum og koma inn.

Lars Løkke Rasmussen er kendur sum ein fólksligur politikkari, sum dugir væl at samskifta og samrøða. Hann byrjar eisini sjálvur prátið okkara millum og prátið fellur beinavegin á ólavsøkuna, sum júst var farin framvið.

– Her eru færri fólk enn í gjár. Tað vórðu ótrúliga nógv fólk úti í gjár ha? Eg segði við Sólrun, at eg helt ikki tað vórðu so nógv fólk úti sum onkuntíð fyrr, men tað komu fleiri og fleiri sum dagurin leið.

Honum fellur eisini lætt at tosa við starvsfólk og gestir, sum vilja fáa orðið á hann. Hann letur til at kenna seg væl til rættis í Føroyum og sambært honum sjálvum, so ger hann eisini tað.

– Eg havi størri frælsi í Føroyum enn í Danmark, og tað dámar mær væl. Tó vil eg siga, at tað koma fleiri fólk yvir til mín og vilja práta, enn tað koma í Danmark. Sum oftast er tað fyri at siga, at tey eisini eiga hús við Gjógv, ella eru í familju við konu mina ella okkurt tílíkt og tað er fínt. Tað dámar mær væl, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Hann sigur víðari, at Føroyar hava sjálvandi havt stóran týdning fyri seg og familjuna. Dentur verður lagdur á, at børnini læra føroyskt og kenna sín uppruna her. Hann sigur, at har hevur føroyska omman, Bergljót av Skarði, havt ein stóran leiklut eisini. Hon hevur lagt nógv í, at ommubørnini skilja føroyskt.

### Avgerandi at stjórnarskipanin virðir grundlógina

Føroyingar skulu skjótt á eina fólkaatkvøðu um eina føroyska stjórnarskipan. Tað er ikki eitt fullveldisskjal, ið vit skulu taka støðu til, men heldur ein staðfesting av, at tá samanumkemur, so liggur valdið í Føroyum hjá okkum sjálvum og at føroyska fólkið hevur sjálvsavgerðarrætt og fullan rætt at siga allar stjórnarrættarligar sáttmálar og altjóða avtalur upp.

Spurdur um hvat støða hansara er, um nú føroyska fólkið atkvøður fyri eini føroyskari stjórnarskipan, svarar hann skjótt:

– Lat meg staðfesta beinavegin, at eg eri heitur talsmaður fyri ríkisfelagsskapinum og sum eg havi skilt arbeiðið við hesum stjórnarskipanaruppskoti, so er hetta eitt skjal, sum virðir verandi grundlóg og stjórnarskipan og tað er avgerandi fyri meg, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Grønland hevur eisini sett ferð á arbeiðið við at gera ein stjórnarskipan, men tey eru ikki komin eins langt sum Føroyar. Lars Løkke Rasmussen sigur, at grønlendingar mangla at stinga ein kós út í kortið og siga, hvørt tað er loysing tey vilja ella ikki. Hann viðurkennir tó, at tað kann verða torført hjá grønlendsku politikarunum at arbeiða við hesum, tí tað er ein sannroynd, at fyri hvørja almenna krónu, sum verður brúkt í Grønlandi, eru 50 oyru komin úr Danmark.

– Har eru Føroyar komnar longur framá enn Grønland og tað haldi eg sæst aftur í arbeiðnum við stjórnarskipanini, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Lars Løkke Rasmussen sigur, at hann skilir væl ynski hjá einum fólki at skipa seg sjálvi og tað hevur hann stóra virðing fyri, men at hann altíð fer at tosa fyri einum felagsskapi, heldur enn at lond taka seg úr einum samstarvi. Hann sigur, at tað hoyrast røddir í fleiri londum, sum siga, at tað loysir seg líka væl at standa einsamallur, men hann heldur at tey hava ikki skilt virðið í einum samstarvi.

– Føroyska samfelagið hevur ment seg við rúkandi ferð í nógv ár og ger tað framvegis. Tað hevur uppiborðið alla virðing. Tó vildi eg mett, at tað hevur eisini fyrimunir fyri føroyingar, at í somu løtu tey koma til Danmarkar, so hava tey somu rættindi sum danir. Eisini viðvíkjandi teim samstørvum, sum vit hava við onnur lond, kunnu føroyingar njóta gott av.

framhald



» Eg havi sjálvsagt eina hugsjón og tað er sjálvandi neyðugt at hava eina hugsjón. Tó hevur lívið lært meg, at vit skulu øll verða her og tað má so finnast ein máti at gera tað frægast uppá

*– Føroyska samfelagið hevur ment seg við rúkandi ferð í nógv ár og ger tað framvegis. Tað hevur uppiborðið alla virðing. Tó vildi eg mett, at tað hevur eisini fyrimunir fyri føroyingar, at í somu løtu tey koma til Danmarkar, so hava tey somu rættindi sum danir*

## Lars Løkke Rasmussen:

*F. 1964 í Vejle.*

*Giftur við Sólrun Jákupsdóttir úr Havn. Saman eiga tey trý børn: Bergur, Símun og Lisa.*

*Politiska lívsleiðin:*

| | |
|---|---|
| 1985: | Valdur í býráðið í Græsted-Gilleleje |
| 1986: | Formaður í Venstres Ungdom |
| 1994: | Valdur á Fólkating |
| 1998: | Borgarstjóri í Frederiksborg Amt |
| 2001-2007: | Innlendis- og heilsumálaráðharri |
| 2007-2009: | Fíggjarmálaráðið |
| 2009-2011: | Forsætismálaráðharri |
| 2015- : | Forsætismálaráðharri |




*framhald*

Eftir míni sannføring, er samstarv altíð lykilin til framburð, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Uttanríkisráðharrin í Danmark, Anders Samuelsen, segði herfyri við grønlendskar miðlar, at Føroyar og Grønland geva Danmark eina sterkari rødd á uttanríkispolitiska pallinum og at tað hevði stóran týdning fyri Danmark. Spurdur um hetta sigur Lars Løkke Rasmussen, at tað er rætt í sær sjálvum, men at tað er ikki avgerðandi fyri ríkisfelagsskapin.

– Á nøkrum økjum fáa vit eina sterkari rødd, tað er víst. Á arktiska økinum til dømis. Tó er tað ikki mín fatan, at okkara støða í einum altjóða samanhangi, stendur og fellur við ríkisfelagsskapinum, sigur Lars Løkke Rasmussen.

## Vil ikki blanda seg í føroyskan politikk

Lars Løkke Rasmussen sat sum ráðharri í innlendis- og heilsumálum og sum fíggjarmálaráðharri, í stjórnunum hjá Anders Fogh Rasmussen frá 2001-2009, tá Fogh Rasmussen fór frá sum forsætismálaráðharri og gjørdist aðalskrivari í hernaðarsamgonguni NATO. Lars Løkke Rasmussen gjørdist eftirmaður hansara sum forsætismálaráðharri.

Sum ráðharri framdi Lars Løkke Rasmussen fleiri nýskipanir. Millum annað stóð hann fyri eini kommununýskipan, tá talið av kommununum lækkaði úr 271 niður í 98, umframt at 14 sýslur í Danmark, blivu minkaðar niður í fimm økir, ið hvør í sínum lagið fingu ábyrgd av sjúkrahúsum og almennum flutningi. Eisini stóð hann á odda fyri størstu lækking í marginalskattinum í Danmark síðan 1903, tá hann sat sum fíggjarmálaráðharri.

Í fleiri ár hava vit í Føroyum tosað um nýskipanir innan fleiri økir og millum annað hevur búskaparráðið fleiri ferðir sagt, at politiska skipanin eigur at seta fleiri nýskipanir í verk. Tó tykist tað verða torført hjá okkara fólkavaldu at gjøgnumføra tær.

Tá eg spyrji hann, um hann hevur nøkur góð ráð til okkara politikkarar, tá umræður at fáa nýskipanir avgreiddar, aftrar hann seg við at geva ráð ella blanda seg uppí føroyska politikk.

– Nei, eg haldi meg frá at geva ráð ella blanda meg uppí. Yvirskipað kann eg siga, at tá umræðu nýskipanir, er umráðandi at hava ein so breiðan meirluta sum gjørligt, tí annars er vandin altíð til staðar, at skipanir verða broyttar tá ein nýggj stjórn tekur við, sigur Lars Løkke Rasmussen.

## ES fekk stóran hvøkk eftir Brexit

Danmark hevur verið partur av ES síðan 1973, tá danir fóru upp í felagsskapin saman við Stóra Bretlandi og Írlandi. Tað hava verið rembingar av og á í parlagnum millum ES og Danmark, men samanumtikið er Danmark ein trúgvur partur av ES, sum ikki fer at fara nakran veg úr ES tað næstu tíðina. Tað hava leiðslurnar í flest øllum donskum flokkum sagt.

Lars Løkke Rasmussen er sjálvur ein íðin fjeppari av ES. Hann ásannar tó, at ES kom í trupulleikar av Brexit. Eingin væntaði, at tað fór at henda og eingin hevði lagt upp fyri, at eitt land fór at melda seg úr. Hann fegnast tó um, at hini 27 londini, sum eftir eru, nú síggja til at hava ein vilja til at styrkja felagsskapin.

– Tað er eingin ivi um, at ES hevur brúk fyri broytingum, so at londini kenna seg væl sum limir. Eg plagi at siga, at ES skal verða lítið í teimum lítlu viðurskiftunum og stórt í teimum stóru. Tað skulu vit fara aftur til, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Lars Løkke Rasmussen sigur, at tað er eingin loyna, at Evropa hevur stórar avbjóðingar í løtuni. Bæði hvat viðvíkur politikki, trygd og ikki minst, flóttafólki og tilflytarum. Hann sigur, at londini í Evropa hava ikki gjørt seg væl út at taka ímóti teim nógvu fólkunum, sum koma inn í Evropa. Tað eru serliga londini sunnanfyri, sum líða av tí.

– Alíkavæl kenni eg á mær, at tað eru orsøkir til bjartskygni, í øllum førum stillisliga. Tað eru fleiri, ið nú taka undir við, at broyta ES grundleggjandi, so tað verður betur pláss fyri teim ymsu londunum og teirra ymiskleika og hvussu skipaninar verða nýttar í teim ymsu londunum. Til dømis hava nógvir danir torført við at skilja, hvussu ein úr eystur Evropa kann koma til Danmarkar og fáa almenna hjálp, sum viðkomandi sendir heim til familjuna. Tað eru pengar, sum danir hava arbeitt fyri. Tað eru ymisk viðurskiftir, sum vit arbeiða við og har haldi eg, at eg til dømis havi ein samstarvsfelaga í nýggja franska forsetanum, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Hann sigur víðari, at nú hevur Evropa brúk fyri at halda saman, tí amerikanski forsetin, Donald Trump, tosar nógv um at føra eina meira verjukenda linju sum forseti, sum millum annað hevur við sær, at lond hyggja heldur til Evropa enn USA og vóna at fáa millum annað handilsavtalur.

– Fleiri lond koma til okkara nú og ynskja samstarv. Serliga síðan Donald Trump gjørdist forseti. Til dømis hava vit gjørt eina fríhandilsavtalu við Japan herfyri. Tað hevur við sær, at Evropa má halda saman. Jú størri vit eru sum marknaður og samstarvsfelagi, áhugaverdari eru vit og betur avtalur fáa vit, sigur Lars Løkke Rasmussen.

## Er brýndur við árunum

Fyrstu ferð Lars Løkke Rasmussen var valdur politikkari, var í 1985, tá hann sum 21 ára gamal varð valdur í býráðið í Græsted-Gillelje. Árið eftir gjørdist hann formaður fyri Venstres Ungdom. Síðani gingu átta ár og trý fólkatingsval, uttan at hann bleiv valdur inn. Í 1994 bar tó til. Tá bleiv hann valdur inn á Fólkating fyri fyrstu ferð og har hevur hann verið síðan. Tá var hann 30 ára gamal.

Í dag eru 23 ár gingin síðan hann gjørdist ein partur av teim bonaðu gólvunum á Christiansborg og sum hann situr í dag, so viðurkennir hann, at 30 ára gamli Lars Løkke og 53 ára gamli Lars Løkke, eru ikki heilt somu persónar.

Hann hugsar seg væl um, áðrenn hann lýsir munin á sær sjálvum fyrr og nú.

– Eg eri ikki so skarpur í kantunum longur. Tað var eg tá eg var ungur og eg hevði eina turkatrúgv uppá, at tað, sum eg segði var tað rætta. Nú eri eg rundari tá eg úttali meg og hugsi kanska meira um, hvussu eg úttali meg. Eg royni at hugsa meira savnandi í dag enn eg gjørdi tá eg var ungur og við aldrinum skilir ein betur tað, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Hann sigur víðari, at tað er allarhelst ein avleiðing av at gerast eldri og hava verið ígjøgnum nógva meira enn ein hevur á yngri árum.

*Er tað neyðugt hjá tær at verða á miðjuni? Er tað ikki eisini neyðugt at verða hugsjónarligur og kunna siga, at her til og ikki longur?*

– Eg havi sjálvsagt eina hugsjón og tað er sjálvandi neyðugt at hava eina hugsjón. Tó hevur lívið lært meg, at vit skulu øll verða her og tað má so finnast eina máti at gera tað frægast uppá, sigur Lars Løkke Rasmussen.




Sosialurin
VIKUSKIFTISBLAÐIÐ HJÁ MIÐLAHÚSINUM | 4. AUGUSTL 2017 | ÁRG. 91, BLAÐ NR. 89
30 KR
VIKUSKIFTI
...GOTT VIKUSKIFTI



*Uppskotið tilstjórnarskipan:*

# HETTA ER Í LAGI

**– Tað er avgerandi fyri meg, at føroyska stjórnarskipanin virðir grundlógina. Og hetta sær út til at vera í ordan, sigur Lars Løkke Rasmussen, danskur forsætisráðharri** s6-8

**TEMA**
**Stórt tema um Fróðskaparsetrið**

*Pipar&Salt 20 ár:*
**– Hittini vórðu av óvart** s18-20

*Rámandi tøl:*
**Bert helvtin fær prógv** s10-15

